# Fuglfirðingar flúgvandi vesturi í Vágum



Mynd: Álvur Haraldsen

**5-MANNAFØR KVINNUR** Við sannførandi sigri syrgdi Erla Kongsdóttir leygardagin fyri, at fuglfirðingar fyri fyrstu ferð nakrantíð vinna FM í kappróðri

Tróndur Arge

Erla Kongsdóttir tryggjaði sær leygardagin FM heitið í kvinnukappingini umborð á 5-mannaførum.

Gamaní er fjarstøðan aftur til Drekan, sum er næstfremst, ikki meiri enn sjey stig, men tá ið tað bara eru fimm bátar í hesi kappingini, so vil tað siga, at Erla Kongsdóttir fær í minsta lagið trý stig á Ólavsøku, um hon bara damlar teir 900 metrarnar av Argjahøvda og inn á málið.

Sjálvsagt ætlar Erla Kongsdóttir at enda róðrarárið við maner, og avrikið á Sørvági leygardagin bendi ikki á annað, enn at Erla Kongsdóttir er favorittur at vinna á Ólavsøku.

Bara eina ferð hevur tað kiksað hjá fuglfirðingum í ár. Tað var á Sundalagsstevnu í Hvalvík, tá ið Drekin vann. Drekin hevur verið í tættari kapping við Firvald um næstfremsta plássið. Leygardagin vóru tað tær á Tvøroyri, sum vunnu ta kappingina, og Blikur av Argjum var ikki so langt aftanfyri.

Tað verður roknað við, at Erla Kongsdóttir fer at koma á mál á Ólavsøku, og at Erla Kongsdóttir harvið vinnur FM. Hetta verður fyrsta FM heitið yvirhøvur, sum fuglfirðingar hava vunnið, síðani tað í 1973 varð farið undir FM kapping í tí líki, sum tað framvegis verður kappast.

Og so eigur sjálvsagt at verða lagt aftrat, at tá ið tað fyrstu ferð yvirhøvur varð kappast um FM í 1964, tá vann 5-mannafarið í Fuglafirði, Erla Kongsdóttir, fyrsta FM heitið yvirhøvur. Tá var tað soleiðis, at tað aftan á Ólavsøku í einum róðri ein sunnudag seinnapart varð kappast um FM. Fyrsti róðurin í 1964 var millum 5-mannafør við kvinnum, og Erla Konsdóttir vann.

Nú hevur Erla Kongsdóttir rokkið so høgt stigatal, at hon verður ikki tikin. Firvaldur, Drekin og Blikur fara ólavsøkuaftan at gera eina nýggja roynd at fanga Erlu. Sannlíkið fyri at tað skal eydnast er ikki stórt, tí vesturi í Vágum vóru fuglfirðingar flúgvandi!

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Erla Kongsdóttir | 05:17.09 |
| 2 | Firvaldur | 05:23.22 |
| 3 | Drekin | 05:24.09 |
| 4 | Blikur | 05:25.11 |
| 5 | Havfrúgvin | 05:35.19 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Erla Kongsdóttir | 41 |
| 2 | Drekin | 34 |
| 3 | Firvaldur | 32 |
| 4 | Blikur | 24 |
| 5 | Havfrúgvin | 19 |



*Páll Fanga er greiður føroyameistari*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Páll Fangi FM fyri fyrstu ferð

**6-MANNAFØR MENN** Fyri triðju ferð í fýra ár endaði meistaraheitið í Norðoyggjum og hesa ferð í Klaksvík, sum ongantíð áður hevur vunnið hesa kappingina

Tróndur Arge

Klaksvíkingar tryggjaðu sær leygardagin eitt FM heiti í kappróðri fyri menn. Tað er ikki á hvørjum ári, at menninir hjá Klaksvíkar Róðrarfelag vinna meistaraheiti, og tað er ongantíð áður komið fyri, at teir hava vunnið kappingina millum 6-mannafør.

Nú kunnu meistaraheitini fyri mannfólk hjá klaksvíkingum ikki teljast á aðrari hondini, men tey eru framvegis ikki mong: Fípan Fagra (2005), Nevið Reyða (2001 og 2005), Klaksvíkingur (2006 og 2009) og so nú Páll Fangi. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað í FM kappingunum, sum tær eru nú, ongantíð eydnaðist mannfólkunum í Klaksvík at vinna FM frá tí, at farið varð undir kappróður eftir galdandi skipan í 1973, fyrrenn í hesi øldini.

Frá 1964 og fram til 1972 varð kappast um FM í einum róðri eftir Ólavsøku, og tá vunnu dreingirnir á Fípuni Føgru í 1964.

Seinastu fýra árini eru trý av FM heitunum í kappingini millum 6-mannafør við monnum vunnin av norðoyingum. Sundabáturin vann bæði í 2007 og 2008, og eftir at FM steypið í fjør endaði á Tvøroyri, verður tað á Ólavsøku handað klaksvíkingum.

Hóast Páll Fangi hevur vunnið allar róðrarnar higartil í ár, so hevur tað hvørja ferð verið sera spennandi, og í fimm teimum fyrstu kappingunum var munurin frá Páll Fanga og aftur til tann næsta ongantíð meiri enn eitt sekund.

Í dýrdarveðrinum í Sørvági var tað eisini spennandi, men tá ið teir fóru um málið, var als eingin ivi. Í endaspurtinum vant Páll Fangi burtur úr øllum hinum, og hesa ferð var fjarstøðan aftur til tann næsta tað mesta av einari bátslongd.

Kappingin var annars skiftandi og tøtt og harvið spennandi.

Páll Fangi fekk besta startin, og hann var fremstur mesta partin av teininum. Men á síðsta triðinginum av 1500 metra málinum var tað tætt og skiftandi. Eina løtu tóktist Fríggjarin at vera á odda, og eina løtu seinni var stavnurin á Tvørabátinum frammanfyri.

Í endaspurtinum vóru tað tó tøkini hjá klaksvíkingum, sum munaðu mest, og Páll Fangi fór um málstrikuna soleiðis, sum tað er einum meistara verdugt.

FM vinnarin frá í fjør, Tvørabáturin, var drúgvasti kappingarneytin hjá sigursharrunum. Hann vann við einari bátslongd á Fríggjaranum, sum var meiri enn tvær bátslongdir frammanfyri Smyril, ið fyrsta partin av teininum hevði verið við í kappingini í oddinum.

Skúgvur endaði á fimta plássi og Hósvíkingur á sætta plássi, og í tøttu kappingini um at sleppa undan aftasta plássi var Jarnbardur nummar sjey, Sølmundur nummar átta og Kollfirðingur nummar níggju.

Strálan fekk ikki høvi at vera við í róðrinum. Hon var kolldømd, tí ein av manningini hevði verið við í øðrum róðri ídag.

*trondur@sosialurin.fo*

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Páll Fangi | 07:12.24 |
| 2 | Tvørabáturin | 07:15.13 |
| 3 | Riddarin | 07:18.22 |
| 4 | Smyril | 07:26.22 |
| 5 | Skúgvur | 07:30.20 |
| 6 | Hósvíkingur | 07:42.17 |
| 7 | Jarnbardur | 07:46.14 |
| 8 | Sølmundur | 07:47.22 |
| 9 | Kollfirðingur | 07:48.10 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Páll Fangi | 42 |
| 2 | Tvørabáturin | 34 |
| 3 | Riddarin | 29 |
| 4 | Smyril | 26 |
| 5 | Strálan | 15 |
| 6 | Skúgvur | 14 |
| 7 | Hósvíkingur | 6 |
| 8 | Jarnbardur | 1 |
| 9 | Lómur | 1 |